## Strongdir prestar

Tað seinasta árið hava 30 danskir prestar sagt seg úr starvi og hava fingið sær annað arbeiði. Orsøkin er sambært prestafelagnum, at arbeiðsumstøðurnar eru ikki nóg góðar. Felagið vísir á, at fyri fimm árum síðani kom ein frágreiðing, sum lýsti umstøðurnar hjá prestunum, og hvussu tær kundu bøtast, men kortini er einki hent. Nógvir prestar líða nú av strongd og rýma, sigur talskvinna teirra, Sabine Bech-Hansen, við Kristeligt Dagblad.

## Kvøldseta í Fuglafirði

Annan hvítusunnudag, 28. mai, skipar Kvøldsetusamtakið fyri sínum sjeynda tiltaki í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Har fer Kenneth Jørgensen at syngja og spæla tvey egin løg til egnar tekstir umframt onnur løg. Lív Næs, sum hevði ein av høvuðsleiklutunum í Fame, fer at syngja, og Helgi Midjord fer at spæla egin løg, sum hann hevur gjørt til ymsar yrkingar. Tiltakið í Mentanarhúsinum annan hvítusunnudag byrjar klokkan 16.

# Sera væl eydnað bátastevna



*Okkurt árið táttaði bátatalið í 200. Í fjør viðraði so illa, og tá vóru nógv færri bátar. Líkindini leygardagin norður ígjøgnum Hestfjørð vóru eisini vánalig við frískum høgættarvindi og hørðum ráki. Kortini møttust nógvir bátar við Fútaklett og stevndu inn á Vestmanna*

**Tá bátarnir høvdu lagt til bryggju í Vestmanna seinnapartin leygardagin, var av besta veðri. Tað var stilt, og sólin skein. Bátafólkið fekk suppu og bátastevnuøl og tey, ið ynsktu sær heitan kjøtmat, kundu keypa sær vælumtóktar bátastevnubúffar. Umborð á bátunum tendraðu tey livandi ljós og bjóðaðu umborð til føroyskan viðskera og okkurt leskandi**

BÁTASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Líka so sjaskut, sum veðrið var, tá bátarnir, ið komu sunnaneftir, stevndu norður gjøgnum Hestfjørð leygardagin, líka so gott var veðrið í Vestmanna, tá teir løgdu til bryggju um 16-tíðina hendan stevnudagin.

Hann var høgur í ættini, og rættiliga sjaskut var í Hestfirði, tá bátar, sum vóru farnir út í Hest kvøldið fyri, loystu aftur haðani og stevndu norður í Vestmannasund. Tíðliga seinnapartin leygardagin skuldu teir møtast við Fútaklett og síðan saman stevna inn á Vestmanna.

### Súpan og øl

Jóngerð Nielsen, forkvinna í VÍF, sigur, at tað vóru ikki allir bátarnir, sum vóru farnir út í Hest, ið hættaðu sær norður í Vestmannasund leygardagin. Tískil fóru nakrir bátar suður um aftur Kirkjubønes og aftur til Havnar og onkrir bátar, sum vóru farnir úr Vestmanna ávegis út í Hest, komu eisini heim aftur, tí líkindini vóru so vánalig.

– Soleiðis, sum líkindini vóru við høgættarvindi suður ígjøgnum Vestmannasund og hørðum ráki í Hestfirði og í sundinum, kunnu vit ikki annað enn vera væl nøgd við undirtøkuna og bátatalið, sum leygardagin stevndi inn á Vestmanna.

Hon sigur, at talið av bátum var millum 120 og 130, og tað eru tey sera væl nøgd við.

– Tá allir bátarnir høvdu lagt til bryggju, varð skipað fyri bjargingarroynd, har nýggi bjargingarbáturin eisini varð royndur

Eftir bjargingarroyndina fingu bátafólkini súpan, og tá fingu tey eisini eina sonevnda bátastevnuøl afturvið. Hetta er ein øl, ið hevur somu styrki sum veðrur, men sum hevur eina serstaka etikett, ið skiftandi verður stuðlað av feløgunum í Vestmanna, ið sigla við ferðafólki undir Vestmannabjørgunum og aðrastaðni.

Jóngerð sigur, at tey eisini hava latið hesa ølina selja í vikuni undan stevnuni í søluni hjá Føroya Bjóri í Havn, og sum skilst, hevur sølan gingið væl.

### Serstakur hugni

– Í fjør seldu vit eisini sonevndu bátastevnubúffarnar, men tá viðraði so mikið illa, at tiltakið, sum krevur hampiliga gott og turt veður, eydnaðist ikki so væl, sum vit høvdu ynskt okkum. Hesaferð gekst nógv betur, og búffarnir gingu sum heitt breyð í besta summarveðri.

Forkvinnan í VÍF sigur, at tey høvdu sett upp borð og stólar, so tey mongu, sum vildu njóta ein góðan stevnubúff, kundu seta seg niður at njóta mat og leskandi.

– Tað setti eisini sín serstaka dám á bryggjuøkið, tá Jóan Jakku Guttesen og Sámal Ravnsfjall spældu





*Gamli og snotuligi báturin Ólavur, sum er bygdur í 1930, tók ímóti øllum bátunum við Fútaklett. Skipari og eigari er Alfred J. Olsen*